# Lands-dysturin á stórskíggja í Keyp-manna-havn

Føroyingar í Keypmannahavn fáa nú eisini høvi at síggja landsdystin millum Føroyar og Sveis beinleiðis

Tað er pubbin The Globe, sum liggur í Nørregade (nær við Nørreport), ið fer at vísa dystin á stórskíggja. Umframt stórskíggjan eru eisini fleiri smærri sjónvørp, soleiðis at øll hava møguleikan at síggja dystin. The Globe hevur boðað frá, at í sambandi við dystin verða føroyskar drekkivørur seldar í barrini.

Dysturin, ið verður leiktur á Svangaskarði, verður bríkslaður í gongd klokkan 17.30 danska tíð.

**sís**

# Arbeiðið í Steinatúni liðugt

Vegarbeiðið í Steinatúni, sum seinastu mánaðirnar hevur sett sín dám á ferðsluna í høvuðsstaðnum, er nú liðugt.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, sigur, at arbeiðið hevur gingið serstakliga væl, og at tað er liðugt nógv fyrr enn væntað. Borgarstjórin sigur, at býráðið hevur roynt at skumpa undir at fáa arbeiðið gjørt so skjótt sum gjørligt. Tí var millum annað avgjørt, at arbeiðast skuldi í trimum skiftum, har tað annars er vanligt, at arbeitt verður bert í einum skifti.

Áðrenn arbeiðið fór í gongd, mettu nógv, at arbeiðið fór at hava við sær, at rættuligur ferðsluruðuleiki fór at verða í miðbýnum, men Heðin Mortensen heldur, at hesum er fullkomiliga sloppið undan, og at ongir trupulleikar hava verið í ferðsluni orsaka av arbeiðinum í miðbýnum.

**tn**

# Íløgan hjá Klaksvíkar Kommunu verður kannað

**Løgmansskrivstovan kannar í hesum døgum íløguna hjá Klaksvíkar Kommunu í íløgufelagið Phoenix, sum herfyri fór á heysin**

KOMMUNUMÁL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Steinbjørn Jacobsen,borgarstjóri í Klaksvík, bíðar óivað spentur eftir, hvørja niðurstøðu Løgmansskrivstovan kemur til í málinum um íløguna hjá Klaksvíkar Kommunu í íløgufelagið Phoenix.*

*Mynd: Bárður*

Milliónin, sum Klaksvíkar Kommuna setti í íløgufelagið Phoenix, er mist. Hetta fekk øði í nógvar klaksvíkingar, tá ið tað kom fram, tí nógv hildu tað verða burturvið, at kommunan setti pening í eitt íløgufelag. Málið kom fyri á landsstýrisborði, og tað verður nú viðgjørt á Løgmansskrivstovuni.

### Landsstýrismaðurin ógegnigur

Vanligt er mál, ið hava við kommunur at gera, verða viðgjørd í Innlendismálaráðnum, men soleiðis er ikki í hesum førinum. Orsøkin er tann, at landsstýrismaðurin í Innlendismálum, Jógvan við Keldu, sjálvur er gamal borgarstjóri í Klaksvík, og tí metir hann seg verða ógegnigan í málinum.

Tískil tók Løgmansskrivstovan málið á seg, og har liggur málið í løtuni. Løgmansstjórin, Marjun Hanusardóttir, sigur, at Løgmansskrivstovan hevur viðgjørt málið, og síðani var eitt skriv sent Klaksvíkar Kommunu, har biðið var um eina frágreiðing upp á nakrar fyrispurningar, sum Løgmansskrivstovan hevði í sambandi við málið.

Í hesi vikuni fekk Løgmansskrivstovan so svarskriv frá Klaksvíkar Kommunu, og hetta skriv verður so lisið og viðgjørt á Løgmansskrivstovuni í løtuni.

### Kunnu revsast við bót

Um so er, at Løgmansskrivstovan heldur, at kommunustýrislimirnir, ið hava verið til at taka avgerðina um íløguna hjá klaksvíkingum í Phoenix, hava borið seg skeivt at, hevur landsstýrismaðurin ella løgmaður fleiri møguleikar. Millum annað kunnu kommunustýrislimirnir verða álagdir at gjalda tvingsilsbøtur sambært Kommunustýrislógini grein 55, stk 2. Eisini er møguligt at saksøkja kommunustýrislim eftir endurgjaldi, um hann ber ábygd av, at kommunan hevur verið fyri missi.

Á Løgmansskrivstovuni verður upplýst, at málið sum so ongan skund hevur, og tí verður tann tíð tikin, ið skal til fyri at fáa eina orduliga niðurstøðu, verður sagt á Løgmansskrivstovuni.

# Útbyggja Kollafjørð Pelagic



*Nú er ætlanin at seta upp eina skerilinju á Kollafjørð Pelagic, sum skal skera sild.*

*savnsmynd*

Nú sildin av álvara tykist verða komin fyri seg, gera teir seg til at byggja út á virkinum hjá Kollafjørð Pelagic.

Ætlanin er at seta upp eina skerilinju á virkinum, sum skal skera sild í eini roynd at tryggja virkinum meiri rávøru.

Christian í Grótinum, Tróndur í Gøtu, Saksaberg og onnur skip royna í løtuni eftir norðhavssild, og fleiri útlendsk skip eru eisini á somu leið. Fleiri av hesum skipum hava verið á Kollafirði og landað til Kollafjørð Pelagic, og fleiri afturat eru væntandi næstu dagarnar.

**tn**